ÚT AT KOYRA

## John Cooper deyður



Fleiri minnast helst navnið Cooper frá Austin/Morris Mini Cooper í 60-unum. Maðurin aftan fyri hesar bilar, John Cooper, er nú deyður, 77 ára gamal, men navn hansara verður enn brúkt á nýggja BMW Mini Cooper S.

*Kelda: Motor Magasinet*

## GMC Terracross



GMC Terracross er ein 4x4, við Versa Track fýrahjólsskipan. Bilurin kann lætt gerast um til ein pick-up ella hálvan cabriolet. Aftastu setrini kunnu leggjast niður til at sova á . Motorurin er ein 2.2 litur V6.

*Kelda: FDM / Motor*

## Volvo Global Trucks



Volvo og amerikanska løgmálaráðið hava undirskrivað eina avtalu, um at AB Volvo kann yvirtaka Renault og Mack lastbilarnar. Volvo Global Trucks, fer soleiðis við Volvo, Renault og Mack at geva 70 prosent av umsetninginum hjá Volvo konsernini.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Strangari ES-krøv til vulkaniseraðu dekkini




**Síðan tey vulkaniseraðu dekkini av fyrstan tíð komu á marknaðin, hava tað verið deildar meiningar um slitstyrkina og kvalitetin sum heild, og tað av góðum grundum. Ógvuliga ymiskt hevur verið sum arbeiði við sjálvari vulkaniseringini hevur verið, og í hvørjum standi dekkini eru, tá slitbanin verður lagdur á**



*Erik N. Rasmussen frá Tobøl Dæk A/S hevur fleiri ferðir verið í Føroyum og vitjað sínar kundar. Fyritøka hansara er ein tann fremsta vulkaniseringsverksmiðjan í Evropa*



*Eitt lastbiladekk fær nýggjan slitbana*

DEKK
*Magnus Gunnarsson*

### Merkingin verður lógarkrav

Framleiðarar av vulkaniseraðum dekkum í Danmark hava í mong ár merkt síni dekk við Dansk Standard (DS-2168), sum tó ongantíð hevur verið eitt lógarkrav. Sum tann fyrsta fyritøkan í Danmark, og ein av teimum fyrstu í Evropa, eru vulkaniseraðu dekkini hjá Tobøl Dæk A/S nú góðkend eftir nýggju ES reglugerðunum, ECE R-109.

Stjórin og eigarin av Tobøl Dæk A/S, Erik N. Rasmussen, sigur, at teir í fjør góvust við DS-2168 merkingini, tí hann væntar, at ES um stutta tíð fer at seta ECE reglugerðirnar í gildi. Persónbiladekk skulu merkjast við R-108, og dekk til lastbilar og bussar við R-109. Hesar merkingar verða væntandi eitt lógarkrav.

### Upp til 1 mill. km.

Danskir myndugleikar hava higartil sett lutfalsliga fá krøv til vulkaniseraðu dekkini. Hetta er at undrast yvir, tá man hugsar um, hvussu stóran týdning dekkini hava fyri koyrieginleikarnar á bilunum og trygdina í ferðsluni. Nýggju reglugerðirnar seta nógv størri krøv til góðskustýringina undir framleiðsluni av vulkaniseraðu dekkunum, ið nú skulu royndarkoyrast á sama hátt sum nýggj dekk. Vit kunnu vænta, at tey vulkaniseraðu dekkini framyvir verða av hægri góðsku. Til dømis eru nýggj kvalitetsdekk til lastbilar og bussar gjørd til at kunna koyra upp til eina millión kilometrar, um tey verða vulkaniserað eftir at dekkmynstrið er niðurslitið. Hetta er sjálvandi treytað av, at lufttrýstið hevur verið tað rætta, og dekkini eru væl viðfarin í aðrar mátar.

### Fleiri mugu gevast

Erik N. Rasmussen frá Tobøl Dæk, ið eisini er formaður fyri "Fabrikantforeningen for Regummierede Dæk", sigur, at hetta fer at føra við sær, at fleiri danskir dekkframleiðarar verða noyddir at gevast, tí tað er ov kostnaðarmikið at leggja um til komandi strongu krøvini. Erik N. Rasmussen hevur fleiri ferðir verið í Føroyum og vitjað sínar kundar, saman við Super Dekk Service, ið umboða Tobøl Dæk A/S í Føroyum.

Dekkfyritøkan bleiv stovnað í 1950 í Vejle. Í 1969 varð hon flutt til lítlu bygdina Tobøl, sum liggur nakað sunnan fyri høvuðsvegin millum Esbjerg og Kolding, har ein 4.000 fermetrar stór nútímans vulkaniseringsverksmiðja er í dag.



*Við nýggju ES reglugerðunum skulu vulkaniseraðu dekkini royndarkoyrast á sama hátt sum nýggj dekk*



ÚT AT KOYRA

# Grand Vitara – ein vælgjørdur jeepur frá Suzuki

**Suzuki eru mest kendir fyri at gera smáar persónbilar og jeepar, ið hava gott umdømi sum orkusparandi og álítandi bilar. Í 1999 vórðu framleiddir 25 milliónir bilar, síðan Suzuki fóru at gera bilar í 1955. Suzuki eigur í dag 57 verksmiðjur í 27 ymiskum londum. Ein stórur partur av húsarhaldunum her hjá okkum fáa dagliga vitjan av einum Suzuki jeepi, tá postbilurin kemur í túnið**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Grand Vitara við 5 hurðum, 2,0 litur turbodiesel við intercoolara*

*Mynd: Jens K. Vang*

### Kvalitetsbilur

Grand Vitara verður gjørdur í tveimum støddum við ávíkavist 3 og 5 hurðum. Nýggjasti Grand Vitara er broyttur nakað framman, eins og setur og inntrekk eru nýggj. Hóast Grand Vitara er ein jeepur, er hann sum ein persónbilur at koyra, léttur at koma inn í, og tá man hevur sett seg inn, merkist beinanvegin at hetta er ein kvalitetsbilur. Alt situr sum tað skal, kontaktirnar eru léttar at handfara, og lætt er at seta seg væl til rættis. Tað at man situr passaliga høgt, gevur gott beinpláss, eisini til stórar persónar. Setrini eru tilevnað soleiðis, at man skal sita stútt og gott í teimum, um bilurin koyrir á ósløttum lendi uttan fyri vanligan koyriveg. Innan eru fleiri smá handskarúm at leggja leggja smálutir frá sær.






*Grand Vitara er ein bilkonstruktión, sum er gjørd til harða koyring uttan fyri vanligan koyriveg*
*Myndir: Jens K. Vang*

### Siðvenju í off-roadarum

Tað merkist, at Suzuki hevur siðvenju í at gera 4x4 off-roadarar, tí Grand Vitara er ein bilkonstruktión, sum er gjørd til harða koyring uttan fyri vanligan koyriveg. Ramman, sum bilurin er settur omaná, er soleiðis gjørd, at ongar ristingar og vibratiónir merkjast á ósløttum, eins og alt er væl goymt undir bilinum fyri at verja ímóti skaðum.

### Tríggjar motorstøddir

Grand Vitara er ein rúmligur 5-persóna bilur, sum fæst við trimum motorstøddum, einum 4 syl. 2.0 litur við 128 hk, ein 2,5 litur V6 og 144 hk, og ein 4 syl. 2.0 litur turbodiesel við intercoolara og 87 hk, ið var tann bilurin, vit royndarkoyrdu. Bilurin hevur góða kraft, og lítið hoyrist til dieselmotorin inni í bilinum. Útgerðin er góð, við t.d. sentrallási, radio, el-speglum og el-rútum og annars alt, sum hoyrir til ein nútímans bil.

Grand Vitara við trimum hurðum fæst einans við 1.6 litur bensinmotori við 94 hk.

**Suzuki Grand Vitara 5/hurðar 2.0 turbodiesel v/intercoolara**

| | | |
|---|---|---|
| Motorurin: | syl. 2,0 litur 87 hk. v/turbodiesel intercooler | |
| Oljunýtsla: | 12,8 km/l | |
| Dekkstødd: | 235/60-16 | |
| Stødd og vekt | | |
| Longd: | 419,5 cm | |
| Breidd: | 78,0 cm | |
| Hædd: | 74,0 cm | |
| Eginvekt: | 450 kg | |
| Totalvekt: | 2025 kg | |
| Prísur: | 5/ hurðar | kr. 252.000,- |
| | sum vøruvognur | kr. 208.000,- |
| Søluumboð: | Sp/f Eyðbjørn Hansen<br>Bilasøla og verkstaður<br>Varðagøta 75<br>FO-100 Tórshavn<br>Tlf. 313375 | |